# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Ein heilsan til Harriet og Jógvan Isaksen á gullbrúdleypsdegnum 9. februar 2007

Ein stórur dagur stendur fyri framman. Eitt sera vælkent par fer sum kappróðrarbáturin um mál 9. februer. Tá hava tey livað saman í 50 ár. Tey hava skrivað sína lívssøgu, sum er væl verd at fylgja. Jógvan sum maður, og Harriet sum kona, ið klárar síni ting í øllum spakføri og gudsótta. Heim teirra er eitt Elim søtt í oyðimørk, har mangur hevur sitið væl undir pálmun teirra, eisini vit bæði Levi og Gretha.



Jógvan kenni eg frá barnsbeini av. Hann var ein kúllur millum hinar kúllarnar. Pápar okkara róðu út saman, so tað bleiv mong línan at rekja og fløkjan at greiða. Hetta hoyrdi við til lívið.

Tíðin gekk, og vit fóru báðir til skips, og skjótt blivu vit forlovaðir. Vit fingu okkum báðir gentu úr Fuglafirði, so har liggur mong ein spennandi søga goymd, tó ikki í plastikposa, teir vóru ikki til tá.

Vit gjørdu nógvar skjótingartúrar bæði til fjals eftir harum og á Víkina eftir álkum. Onkur skarvur lá eisini eftirá.

Seinni fóru vit báðir við sama skipi og báðir á brúnna. Har vóru nógvar søgur fortaldar, men eg haldi, at eg fari at fortelja um hin tiltikna harutúrin. Henda morgunin, vit skuldu fara at skjóta harur, var eg heldur seinur. Eg var nýliga komin av skipi og nakað fitnaður, so eg fann ongar buksur, sum passaðu. Nú vóru góð ráð dýr. Allir vóru ótolnir at sleppa avstað og bóðu meg skunda mær. Einastu ráð vóru at fara í ongum undirbuksum.

Tá vit vóru komnir niðan í Neytadal, leypir ein hara, og eg skjóti og raki, men haran rann eitt petti og eg aftaná. Tá eg skuldi gleiva upp um ein stóran stein, var eitt brak, og buksurnar skrædnaðu frá reimini framman og líka niður í skrevið. Men einki var at gera. Tá vit, sum avgjørt var frammanundan, møtast við Seturssklett á Borðoyarnesi, royndi Jógvan at leysa skrallið aftur, men lítið hjálpti, tí ov lítið tilfar var at seyma í.

Síðani fóru vit allir til gongu út á Borðoyarnes.

Tá eg og Dánjal, sum fylgdust, komu niðaná, gekk ikki longur. Eg mátti biðja Dánjal um hjálp. Hann var í føroyskum undirbuksum, og bað eg hann lata meg fáa tær. Í meðan vit báðir skifta, kemur Otto og hann spyr, hvat ólukkan er á vási. Har bleiv ein øgiligur látur, og mínar skrøddu buksur fóru sendandi út av einum hamri, men dagurin var bjargaður. Nú var eg heitur restina av degnum.

Jógvan og eg kennast sera væl, og er hann ein skilamaður bæði á sjógvi og landi. Hann hevur havt mong álitisstørv – millum onnur borgmeistari, skipari og nevdarlimur í fleir nevndum.

Tað besta er tó, at hann og Harriet komu til trúgv á ungum árum og hava staðið sum tveir vitar í bygdini.

Nógvir túrar eru gjørdir runt í landinum við gleðiboðskapinum, og trúfesti tykkara í samkomuni hevur verið stórt. Hvat ið bíðar okkum í tí ljósa landi, vita vit ikki, men tað verður stórt. Harrin er har, hann, sum fyllir alt í øllum.

Vit eru mong, ið gleðast saman við tykkum, nú tit fara um fimmti ára linjuna. Eisini vilja vit senda eina kærleiksfulla heilsan til børn tykkara, sum altíð eru so vinarliga og fyrikomandi at møta. Sanniliga er tað hugnaligt at detta inn á gólvið í Brekkuni.

Nú venda vit okkum móti himli í bøn við tøkk fyri tað, sum farið er, og leggja komandi dagar í Harrans hendur. Vit ynskja tykkum mong góð ár afturat, um Harrin bíðar við at koma.

Vit takka hjartaliga fyri gott brøðra- og vinarlag frá barnsbeini av til dagin í dag.

Hjartaliga til lukku við gullbrúdleypinum.

Bestu heilsur við Sálmi 115.15

**Levi og Gretha Joensen**



## Til pápa mín
# Svenn Brimheim

*Góði babba, stutt var títt tíðarskeið*
*tá Harrin tók teg til sín*
*teg gloyma kann eg ei.*

*Takk fyri umsorgan, kærleika og vernd*
*- takk fyri teg!*

*Nívandi er saknur, og hjartað tungt av sorg er*
*nú vit ei longur hava*
*títt blíða andlit her.*

*Má Jesus-pápi gleðast um teg*
*kærur hann tær var*
*hjá okkum eftir; minnini um teg.*

*Nú hvíl í friði fyri síðstu ferð*
*at himnaborg eg heilsu til tín sendi*
*takk fyri tíð á fold, ið tú vart her*
*eg veit, at tryggur tú hjá Guði heima lendi.*

**Eilif**

## Mikkjal Sørensen tikið sæti tingi

Mikkjal Sørensen úr Porkeri hevur tikið sæti á tingi fyri Sverra Midjord, løgtingsmann. Á løgtingsvalinum í 2004 fekk Mikkjal Sørensen fjórðflestar atkvøður á javnaðarlistanum í Suðuroy.



Mikkjal er harumframt kommunustýrislimur í Porkeri. Tingarbeiðið er ikki fremmant fyri honum. Umframt at hava verið inni sum eykamaður, hevur Mikkjal sitið á tingi frá 1991-93.

Sverre Midjord hevur farloyvi frá tinginum til og við 23. februar.

Jan Petersen:

## Nýggjur fíggjarstjóri á Føroya Tele

Jan Petersen er settur í starv sum fíggjarstjóri á Føroya Tele eftir, at Heini Joensen hevur sagt seg úr starvi.

Jan Petersen er 34 ára gamal klaksvíkingur og útbúgvin HD í roknskapi.

Jan Petersen hevur starvast á fíggjardeildini á Føroya Tele við fíggjarstýring og roknskapi í 5½ ár. Eitt tíðarskeið var hann fíggjarstjóri hjá JFK í Klaksvík. Umframt hesar arbeiðsroyndir hevur Jan Petersen eisini starvast hjá Nilfisk Advance í Keypmannahavn sum controller og sum grannskoðari hjá Rasmusen og Weihe.

Málini hjá Føroya Tele eru ambitiøs og vit eru vís í, at hann sum fíggjarstjóri fer at verða hollur stuðul undir strategiini at menna FT framyvir.

Jan Petersen tekur við starvinum 1. mars 2007.

†

### Andlát og jarðarferðir

**Símun Pauli Lilaa, ættaður úr Leirvík búsitndi í Reykjavík**, andaðist 31. januar 82 ára gamal.

**Dagurin**

**8. februar. Korinta**, deyð umleið ár 250. Kristin kona í Aleksandriu, sum ikki vildi ofra til heidnar gudar og tí varð tikin av døgum.